# Innrás úr útnorðri á donskum sjónleikarskúla



Føroyski sjónleikarin Barbara Christophersen er við í leikinum »True Love« sum verður frumsýndur í Keypmannahavn í kvøld

**Tá leikurin True Love hevur frumframførslu á Film/teaterskolen Holberg í Keypmannahavn í kvøld, verður tað við ikki minni enn fimm íslendskum og einum føroyskum leikara á pallinum**

SJÓNLEIKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*
*Myndir: paldis.com*

Av teimum níggju næmingunum, sum í kvøld fara undir sína fráfaringarsýning á Film/Teaterskolen Holberg í Keypmannahavn eru ikki færri enn fimm íslendingar og ein føroyingur. Til samanberingar kann sigast, at bert ein dani er á hesum árganginum. Harumframt eru ein russi og ein bosni við. Saman fara tey í døgunum 11.-19. mai at framføra leikin True Love eftir amerikumannin Charles L. Mee. Tað er danin Lars Henning, ið hevur umsett og tillagað leikritið, og hann leikstjórnar sjálvur.

Føroyska sjónleikarkvinnan Barbara Christophersen hevur seinastu trý árini útbúgvið seg til sjónleikara á Film/teaterskolen Holberg í Keypmannahavn. Tá Tjóðpallurin herfyri setti upp leikin Náttarherbergið eftir Maxim Gorkij, var hon í sambandi við sína starvsvenjing á Tjóðpallinum fyrstu ferð at síggja á professionellum føroyskum sjónleikapalli. Eftir seinastu sýning av Náttarherberginum fleyg Barbara beina leið til Danmarkar, har hon saman við hinum átta, ið gerast liðug við sjónleikarútbúgvingina í summar fór undir framleiðsluna av leikinum, ið má metast sum eitt slag av sveinastykki fyri fjølmentaða árgangin.

## Avbjóðar vanahugsan

Leikurin er ein sterk lýsing av kærleika og bjóðar allari vanahugsan av. Í leikskránni stendur skrivað, at nøkur av teimum sløgum av kærleika, ið verða umrødd í hesum stykki, trýsta á nøkur mørk fyri opinleika. Men, at leikurin ikki tekur nakra moralska niðurstøðu. Hetta er bert ein lýsing av menniskjaligu rávøruni, ið vit hava at arbeiða við, og sum vit byggja okkara samfelag á.

## Íblástur úr Grikskum

Høvundurin Charles L. Mee hevur skrivað fleiri leikrit, ið á onkran hátt fáa íblástur úr grikskum stykkjum, True Love er eitt av hesum. Charles L. Mee sigur, at hann eins og Shakespeare og grikkarnir hevur skilt, at tær nýtist ikki altíð at finna upp á eina søgu, til ber ístaðin at stjala eina. Um sín hátt at arbeiða við griksku stykkjunum, sigur Chares L. Mee, at hann tekur grikska leikritið og smildrar tað sundur, til bert leivdir eru eftir. Síðan skrivar hann eitt nýtt leikrit á leivdirnar. Soleiðis hevur Charles L. Mee arbeitt í longri tíð, og við tíðini er bert andin av upprunaligu søgunum eftir. Hann sigur, at í hesum stykkinum True Love, er hansara arbeiðsháttur komin heilt út av stýring, og bert ein lítil leivd av upprunaliga plottinum er eftir. Í True Love fær høvundurin íblástur at grikska klassikarum Euripides' Hippolytes. Hann sigur sjálvur, at hann hevur flættað tekstir av Leo Buscaglia, Kathryn Harrison, brøvunum hjá Simone de Beauvoirs, Andy Warhol, Valerie Solanas, Wilhelm Reich, útskriftir av rættarsøkini hjá Menendez brøðrunum, Gerald G. Jampolsky, lívssøguni hjá Jean Steins av Edie Sedgewick og tekstum funnum á alnetinum.




## Innbjóðing til Føroyar

Sýningarnar av True Love eru almennar, men sera avmarkað atgongd er til tær. Tilber at tryggja sær atgongumerki við at ringja til Film/teaterskolen Holberg, á tlf: +45 35 36 36 89. Skúlin hevur sent innbjóðingar til fleiri ymisk leikhús í Íslandi og sjálvandi eisini til Tjóðpall Føroya. Tað sæst eisini í leikskránni, at føroyingar og íslendingar eru við í leikinum. Sjónband hevur prentað bæði leikskrá og plakatir, ið eru gjørdar av einum føroyskum sniðgeva og eini íslendskari myndakvinnu. Stuðlað leikinum hava íslendska FL-Group og føroyska Flogfelag Føroya.

Sunnudagin 13. mai frá kl. 11.30
Bjóða henni á Rio Bravo
Mammudagin

Vit bjóða spennandi
3-rættirs "Surprise-menu"
255,-
Børn ½ prís
- tey fáa eisini eina gávu!
Bílegg borð
á tel 319767/ 212955
RIO BRAVO RESTAURANT
Tórsgøta 11 · Tórshavn
Tel 31 97 67 · www.riobravo.fo
TEAM85

Føroya Handilsskúli á Kambsdali søkir eftir
LÆRARUM
at undirvísa á HH og FHS á Kambsdali frá 1. august 2007.
Les meira á www.fhk.fo
VASTI 459010
FØROYA HANDILSSKÚLI
Føroya Handilsskúli á Kambsdali | Kamsdalur | FO-530 Fuglafjørður
Tel. +298 444900 | www.fhk.fo